ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 20. januar 2010

# Eiði fær finalurnar

**Aftur í ár hevur Flogbóltssambandið valt at lagt hálvfinalu í steypakappingini í ítróttarhøllini á Eiði, umframt at FM-finalurnar í mars eisini verða spældar har. – Kanska hetta økir um áhugan fyri flogbóltin har um leiðir, sigur formaðurin í Flogbóltssambandinum**



Hilmar Jan Hansen

Í kvøld klokkan 19 bresta Fleyr og Dráttur saman í hálvfinaluni í steypakappingini, sum verður í ítróttarhøllini á Eiði. Her verður spælt eftir prinsippinum hjá ABBA, at »the winner takes it all«, tí vinnarin kemur í steypafinaluna, sum verður tann 20. februar í Havn ímóti kvinnunum hjá SÍ.

Annað árið á rað hevur Flogbóltssambandið valt at lagt hálvfinalu í steypakappingini á Eiði, og enntá eru liðini tey somu sum í fjør, tá tað eydnaðist Fleyr at vinna og koma í finaluna, sum eisini tá var ímóti SÍ. So fæst at síggja í kvøld, um tað verður endin ella um Dráttur endurtekur sigurin á Fleyr frá sunnudeginum í Føroya Banka-kappingini.

– Tað eru fleiri góðar orsøkir til, at vit velja at spæla hesa hálvfinaluna á Eiði, eins og vit eisini fara at spæla har, tá landskappingin er av og føroyameistaraheitini í Eik-liguni hjá kvinnum og monnum skulu avgerast við FM-finalum, sum verða eftir lokna landskapping í mars mánaði, sigur Magnus Tausen, formaður í Flogbóltssambandinum.

– Ein orsøk er, at tað er heldur lættari at sleppa fram at ítróttarhøllini á Eiði, sum kanska ikki er so upptikin sum fleiri av hinum hallunum. Hartil er hetta ein øgiliga góð høll, ið gevur slíkum dystum bestu umstøður, og bæði hallarvørðurin og onnur á staðnum eru sera hjálpsom.

### Vilja kveikja áhugan

Eisini ein onnur orsøk býr undir, at farið verður til Eiðis við finalunum, og tað er at kveikja áhugan fyri flogbólti í umráðnum. Har er eitt felag, Nøvan, sum hevur verið til síðani 1991, men eftir nøkur góð ár at byrja við, hevur felagið ligið eitt sindur lágt, men mennir seg aftur.

Millum annað átti Nøvan meistarar í dreingjum 16 ár bæði í 1994 og 1995, umframt at liðið í 1996 vann 3. deild hjá monnum, í 1997 1. deild og í 1999 vann 2. deild. Síðsta heitið hjá felagnum liggur afturi í 2002, tá gentur 10 ár gjørdust føroyameistarar.

Nú hevur Nøvan lið í 2. deild hjá bæði kvinnum og monnum, og í løtuni eru tey ávikavist nummar trý og nummar tvey. Harumframt er felagið eisini við hjá bæði gentum og dreingjum 16 ár, og somuleiðis hjá Nøvuni hevur verið stór tilgongd í smábarnaflogbóltinum, tí sokallaða Kidsvolley. Nøvan tekur sær eisini av at skipa fyri øllum í sambandi við hálvfinaluna í kvøld.

– Kann tað, at vit leggja nakrar finalur og hálvfinalur á Eiði, økja um



**– Kann tað, at vit leggja nakrar finalur og hálvfinalur á Eiði, økja um áhugan fyri flogbólti har á leiðini, er nógv vunnið, sigur Magnus Tausen, formaður í Flogbóltssambandinum**
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

## FAKTA

### Steypafinalur

Oddaliðini í Eik-ligunum hjá kvinnum og monnum, tá ávikavist ein triðingur og helvtin av landskappingini er farin, koma beinleiðis í steypafinaluna.

Vinnarin av FK-kappingini og vinnarin av Føroya Banka-kappingini, sum ávikavist Fleyr og Mjølnir skipa fyri, vinna sær rætt til at spæla hálvfinalu í steypakappingini. Vinnur eitt lið báðar kappingarnar, kemur tað beinleiðis í steypafinaluna.

### FM-finalur

Nummar eitt og tvey í landskappingini í Eik-ligunum hjá kvinnum og monnum spæla FM-finalur, har spælt verður best av trimum dystum.

Tveir teir fyrstu dystirnir verða spældir á uttanveltaðum vølli, men er neyðugt við einum triðja finaludysti, hevur tað liðið heimavøll, sum var nummar eitt, tá landskappingin endaði.

# Dráttur bjóðar til kapping

Flogbóltsfelagið Dráttur bjóðar nú liðum í yngru deildunum til kapping á Giljanesi leygardagin 6. februar. Vegna plásstrot ber bert til at melda seg til í deildunum kvinnu- og mansunglingar, gentur og dreingir 12 ár, gentur og dreingir 10 ár, umframt gentur og dreingir í Kidsvolley, level 0, 1 og 2. Freistin at melda seg til kappingina er úti sunnudagin 24. januar. Meira fæst at vita um tilmeldingina á heimasíðuni hjá Flogbóltssambandinum.



# 105 lið meldað til yngru Føroya Banka-kappinga

Ikki færri enn 105 lið hava meldað seg til, so tey kunnu vera við í Føroya Banka-kappingini fyri yngru deildirnar í flogbólti, sum Mjølnir skipar fyri leygardagin. Í onkrum av aldursbólkunum eru so nógv lið tilmeldað, at neyðugt er við fýra bólkum í innleiðandi umførunum. Kappast verður í deildunum kvinnu- og mansunglingar, gentur og dreingjur 16, 14, 12 og 10 ár, umframt Kidsvolley, level 1 og 2. Eins og hjá teimum vaksnu fyri viku síðani, verður spælt bæði í Badmintonhøllini, báðum fimleikahallunum og skúlanum á Fossanesi.

# Jan dømir í Tjekkia

Týskvøldið 2. februar hevur føroyski altjóða flogbóltsdómarin, Jan Hentze, eina spennandi uppgávu, tá hann skal døma eina av áttandapartsfinalunum í Challenge Cup, sum er tann minsta av teimum trimum europeisku kappingunum fyri feløg, sum CEV skipar fyri.

Dysturin verður spældur í Tjekkia, har VK Dukla Liberec í fyrru áttandapartsfinaluni hevur heimadyst ímóti rumenska CS Remat Zalau. Jan Hentze skal døma henda dystin saman við serbiska dómaranum, Goran Gradinski.

– Sjálvt um hetta er ein dystur í minstu CEV-kappingini, er hetta ein góð uppgáva hjá mær at fáa, tí talan er jú um flogbólt á høgum stigi. Hetta er annars fyrstu ferð, at eg dømi dyst millum tvey eystureuropeisk lið, og tað gleði eg meg til, sigur Jan Hentze.

Í løtuni er hann staddur í Danmark, so hann hevur ikki í síðstuni havt ta stóru dystarvenjingina frá føroyskum flogbólti, sum hann annars er vanur at hava. Men hósdagin skal hann døma ein dyst niðri saman við einum donskum dómara, so tað skuldi eisini givið eitt sindur av kærkomnari venjing undan altjóða avbjóðingini.

**hil**



**Jan Hentze skal í næsta mánað aftur í altjóða eldin, tá hann skal til Tjekkia at døma ein dyst í Challenge Cup**
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir